átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið

## Jesus, minst til mín!

*Hesa vikuna:*



**John S. Myllhamar**

**"Jesus, minst til mín, tá ið tú kemur í ríki títt!"**

**(Lukas evangelium 23, 42)**

Tað kennist so løgið, tá ið vit ikki so frægt sum kunnu samla tankar okkara til eina bøn við væl valdum orðum. Vit munnu vera fleiri, ið kenna slíkar tíðir, har sorg ella sjúka legði alt okkara í sor, ella tá ið møði gjørdi, at vit ikki orkaðu meira. Vit royndu at biðja, og vit vistu, at tað var einki vit høvdu størri tørv á, enn at tosa út við Guð, men vit orkaðu ikki.

Í slíkum løtum eru tað trý ting vit kunnu finna ugga í.

Í fyrsta lagi, at nógvar av teimum bønum, vit lesa í Nýggja Testamenti, eru sera stuttar. Tær eru hjartasuff frá menniskjum í neyð: Guð náði meg syndara! Harri, hjálp mær! Jesus, miskunna mær! - Hesar stuttar bønir vórðu hoyrdar. Okkum nýtist ikki at koma við drúgvum og neyvum frágreiðingum fyri at fáa Guð at skilja okkara støðu.

Í øðrum lagi, er tað ein troyst at hugsa um, at tann fyrsti, Jesus tók við sær heim, var ein illgerðarmaður, ið burturav var latin yvir til Guðs miskunn. Jesus er hin sami náðifulli frelsari í dag. Hann bjargar tí glataða, og hann reisir upp tey falnu, tá ið tey leita til náði hansara.

Í triðja lagi er tað ein troyst at hugsa um, at hann minnist til okkum, eisini í teimum løtum, tá ið vit ikki eru før fyri at samla tankar okkara sum vit vilja. Hann biður fyri okkum, at trúgv okkara ikki má tróta. Hann minnist til okkum, at vit eru dust, og hann sleppur okkum onga tíð. Tí kunnu vit siga: Minst til mín nú, tú ert í ríki tínum! Ikki, tí eg havi tað uppiborið, men eina tí, at tú ert ein náðiríkur og miskunnsamur frelsari! Amen!

# Við gleðiboðskapinum umborð á skipini

**Tey seinastu 90 árini hevur Føroyska Sjómansmissiónin arbeitt millum føroyskar sjómenn. Tá verksmiðjutrolarin Atlantic Navigator herfyri fór nýggjan túr, var sjómanstrúboðarin Henry Christiansen sjálvandi ein túr umborð**



*Henry klárur at fara umborð á Navigator við andaligum tilfari. - Sjófólki dámar væl kristnan sang, sigur sjómanstrúboðarin Henry Christiansen*
*Mynd: Snorri Brend*

**Sjómansmissión:** – Eg var nakað seinur til Klaksvíkar, tí eg havi sitið á fundi í allan dag. Men eg nái so akkurát umborð, áðrenn teir fara avstað um eina løtu, sigur Henry sum er úr Leirvík.

Her í Ánunum hava tey umborð á Navigator riggað til nýggjan túr, og manningin er so líðandi komin umborð. Um lítla løtu verður mynstrað og síðani siglt.

Úr bili sínum tekur Henry ymiskt tilfar í hondina, og skundar sær niðan landgangin og inn í messuna, har manningin er savnað.

Her er talan um kristiligar bøkur og bløð, umframt sjónbond og fløgur við upptøkum av sangi og øðrum. Hetta hevur manningin so møguleika at stytta sær stundir við, tá tey hava frívakt.

– Sjómonnunum dáma serliga væl, um sangur er á fløgunum, sigur Henry.

Vanliga er tað Torleif Johannesen av Nesi, sum røkir hesar uppgávuna. Men hann er í farloyvi, og tí verður Henry í hesum starvinum fram móti sumri.

### Gleðiboðskapurin

Umframt arbeiðið sítt at vitja sjómanskvinnuringarnar kring landið, er hetta við skipavitjanum eitt annað av týðandi endamálunum við hesi missiónini, nevniliga at bera sjófólkinum gleðiboðskapin um Jesus.

Líkt er eisini til, at fløgur og bond verða dúgliga tikin fram umborð. Tað kemur eisini meiri enn so fyri, at menn biðja um meiri tilfar, tí tað gamla er vorðið slitið.

– Slíkt er hugaligt at hoyra hjá einum sjómanstrúboðara, sigur Henry við einum brosi.

Tá Henry er umborð á skipum við tilfari, er vanligt at hann eisini steðgar eina løtu og fær sær eitt prát við manningina.

Tað er sjálvandi altíð ójavnt, hvønn veg eitt slíkt prát fer. Í roynd og veru er tað sjómaðurin, sum avgerð tað.

– Eg havi sjálvur siglt alt mítt vaksna lív, so eg veit nøkulunda, hvussu eg skal koma í prát við teir og hvørji evni eru áhugaverd.

– Hinvegin so ynski eg eisini at tosa við teir um andalig viðurskifti. Tað er kanska ikki altíð so lætt, men eg geri tað, har eg føli at tað er rætt, sigur Henry Christiansen.

# Kvinnur meiri religiøsar enn menn

**Ein kristin rørsla í Danmark hevur sett sær fyri at fáa menn aftur í kirkju. Spurningurin er, hví menn hava so stórar trupulleikar við trúnni.**

**Kirkjan:** Fleiri kanningar hava prógvað, at kvinnur eru meiri virknar innan átrúnaðin enn menn. Hetta ætla nakrir menn sær nú at broyta.

Farna vikuskifti skipaðu teir fyri ráðstevnu um hetta evnið í Roskilde. Ein sannroynd er tó, at teir hava alla kirkjusøguna ímóti sær: Kvinnurnar kring allan heimin hava altíð verið trúgvari móti kirkjuni enn menninir.

– Leikluturin hjá kynunum hevur altíð verið ymiskur, sigur religiónssosiologurin Peter Luchau við Kristeligt Dagblad.

Hann vísir á, at tá ein spyr fólk um, hvørja fatan tey hava av Gudi, svara menninir oftari enn kvinnurnar, at teir als ikki trúgva á nakran gud.

– Henda avgjørda og fastlæsta støðan tiltalar menninar meiri, meðan kvinnurnar gjarna lata dyrnar standa á gloppi, sigur hann.

Nógv bendir á, at fólk ganga í kirkju fyri at finna sosialar relasjónir og svar uppá andaligar spurningar. Hetta hóskar væl saman við teirri søkjandi kvinnuni og tí meiri kensluliga afturlatna manninum.

Ein professari í religiónssøgu, Armin Geerts heldur at væl menti sosiali intelligensurin hjá kvinnuni er nógv størri enn tann hjá monnum.

Sosiologurin, Hilda Rømer Christensen frá Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn leggur aftrat, at menn søguliga hava valt politiskt virksemi heldur enn átrúnaðarligt.

– Siðbundna økið hjá kvinnuni var heimið, har nærleiki var við lívið og deyðan, og sum nógvir menn ikki upplivdu. At fara til eina gudstænastu, kundi tí vera eitt tiltrongt andarhol.

## Ung tosa um sína trúgv

**Zarepta:** Komandi vikuskiftið verður serstøk ungdómslega hildin í Vatnsoyrum, har evnið verður trúarverja.

Til leguna hevur tað eydnast at fáa ein úr høvuðsleiðsluni í missiónsfelagsskapinum, New Tribes Mission at luttaka. Paul McIlwain úr Australia fer her millum annað at tosa um, hví ein skal trúgva.

## 67.000 færri í fjør

**Noreg:** Aldrin áður hevur talið av limum í norsku kirkjuni verið lægri, enn tað var í fjør. Limatalið minkaði við 67.000 limum og nú komið niður á sløk 83 %av norska fólkinum.

Orsøkin til stóra fallið er at finna í arbeiðinum við at dagføra limatalið í kirkjuni.

– Fleiri teirra vóru als ikki limir í kirkjuni, og tí eru vit fegin um at hava eitt limatal í dag, sum er so nær tí veruliga sum gjørligt, sigur leiðarin í norska Kirkjuráðnum Jens-Petter Johnsen við norska blaðið Vårt Land.

## Savna klæðir til Rumenien

**Ebenezer:** Hesa vikuna hava fólk havt møguleika at lata inn klæðir, sum síðani verða send til Rumenien.

Hetta er eitt tiltak sum Birgir Andreasen hevur staðið fyri í mong ár, hagar hann er farin við bussum, fullsettum av klæðum.

Sum skilst er ætlanin hesaferð at senda klæðini við bingjum, sum fólk í móttakaralandinum síðani heinta.

## 100-tals barnarøddir á einum staði

**Barnakór:** Aftur í ár verður árligi felagsdagurin "Sangdagur barnanna" á skránni, hesaferð í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 14. apríl.

Hetta er dagurin, tá barnakór úr øllum landinum hittast at syngja fyri hvørjum øðrum og saman. Møguleiki er eisini hjá teimum, ið ikki eru í nøkrum barnakóri, at verða við.

Sangdagurin endar við konsert kl. 15, har barnakórini og felagskórið luttaka.